# VB ætlar sær sigurin

**Skála hevur tvey leikbann, men vóna kortini at fáa onkra úrtøku í dystinum ímóti VB**

UPPTAKT
*Páll Holm Johannesen*

Vágbingar fáa vitjan av Skála á Eiðinum sunnudagin. Vágbingar hava eftir eina stak óhepna byrjan á kappingarárið, fingið eitt sindur av vindi seglini, og úrslitini eru batnaði. Sunnudagin fáa teir so møguleikan at økja um stigatalið, tá botnliðið av Skála kemur á vitjan.

Skálamenn berjast fyri lívinum í fyrstu deild, og bíða framvegis eftir at vend skal koma í. Teir hava verið nær við fleiri ferðir, men enn hava teir fyrsta sigurin til góðar í 1.deild.




*Skálamenn vænta sær torføran dyst í Vági, men vóna kortini at fáa onkra úrtøku úr dystinum.*
*Mynd: Savnsmynd*

### Zivkovic framvegis skaddur

Jugoslaviski verjuspælarin hjá VB, Predrag Zivkovic, er framvegis skaddur, og hann verður heldur ikki við í vikuskiftinum.

Tá VB gjørdist Føroyameistari í 2000, varð Predrag Zivkovic mettur at vera besti verjuleikari í landinum, men hann hevur so at siga ikki leikt í ár, og enn røkist onki fyri at hann gerst klárur.

Pólski framherjin, Robert Cieslewicz, er eisini ivasamur undan dystinum, men vágbingar vóna at gerst klárur.

Úr Vági verður sagt, at kravið má vera ein sigur, tá eitt botnlið kemur á vitjan, men vænta tó ein torføran dyst, serliga nú Skála stríðist fyri niðurflyting.

### Tvey leikbann

Hjá Skála eru Kári Nielsen og Gigi leikbannaðir, og tí verða teir ikki víð ímóti VB. Annars hevur Danial Hansen framvegis ein smáskaða at dragast við, men av Skála vænta tey við vissu, at hann gert klárur.

Annars verður sagt av Skála, at tað altíð er torført at spæla í Vági, men at skálamenn fara at royna at fáa sum frægast burturúr.

Venjarin hjá Skála, Mathias Davidsen sigur seg slettis ikki hava mist vónina um ein framhaldandi sess í 1.deild, tí, sum hann sjálvur sigur, so eru seks dystir eftir, og alt kann henda.

Mathias vísir eisini á, at tað er strævið at liggja í botninum eitt heilt kappingarár, men onki annað er at gera, enn geva sítt ítarsta hvønn dyst, og so má man bara fáa at síggja, hvussu langt tað røkkur, sigur Mathias Davidsen at enda.

## Dystirnir í vikuskiftinum:

1. deild menn:
GÍ-HB
B36-TB
NSÍ-EB/Streymur
VB-Skála
KÍ-B68

2.deild menn:
FS Vágar-B71
KÍ-B36
ÍF-Sumba
VB-LÍF
HB-NSÍ

1.deild kvinnur
B36-B68
Skála-HB
KÍ-GÍ

## Hagtøl tey seinastu 10 árini

| | '01 | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B36-TB - | - | - | 7-0 | - | 3-1 | 1-0 | 6-0 | 2-0 | 1-2 | |
| GÍ-HB | 3-2 | 1-2 | 1-2 | 1-3 | 1-1 | 5-1 | 2-1 | 4-1 | 0-0 | 1-2 |
| KÍ-B68 | 2-2 | 4-1 | 5-0 | 4-3 | 2-2 | 1-1 | 4-3 | 6-3 | 1-0 | 1-1 |
| NSÍ-EB/S | 1-0 | - | - | - | - | - | - | 4-2 | - | - |
| VB-Skála | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |

### 1. deild menn

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 NSÍ | 12 | 7 | - | 3 | - | 2 | 21 | 13 | 8 | 24 |
| 2 HB | 12 | 7 | - | 2 | - | 3 | 33 | 14 | 19 | 23 |
| 3 KÍ | 12 | 7 | - | 2 | - | 3 | 29 | 16 | 13 | 23 |
| 4 GÍ | 12 | 7 | - | 1 | - | 4 | 20 | 18 | 2 | 22 |
| 5 B36 | 12 | 6 | - | 2 | - | 4 | 37 | 19 | 18 | 20 |
| 6 B68 | 12 | 5 | - | 5 | - | 2 | 19 | 17 | 2 | 20 |
| 7 VB | 12 | 4 | - | 3 | - | 5 | 10 | 9 | 1 | 15 |
| 8 EB/Streymur | 12 | 3 | - | 2 | - | 7 | 16 | 26 | -10 | 11 |
| 9 TB | 12 | 1 | - | 3 | - | 8 | 12 | 45 | -33 | 6 |
| 10 Skála | 12 | 0 | - | 3 | - | 9 | 9 | 29 | -20 | 3 |

spf
Gólv Búni
*alt* innan gólválegging
BAÐIRÚM
um tú skal hava gjørt baðirúmið,
so ring til okkara, vit gera:
vegg og gólv *í* brúsu
vegg og gólv *uttan fyri* brúsu
Góðkent sveisicerfikat til baðirúm
**Sunleif Nielsen tlf. 210115**
**Monrad Mouritsen tlf. 210116**



# Myndirnar av vinnarunum av AB Cup 2002



*Vinnarar hjá pinkulingum gjørdist TB*



*Vinnarar hjá dreingum gjørdist VB*



*Vinnarar hjá gentum 14-17 ár gjørdist HB*



*Vinnarar hjá smápiltum gjørdist TB*



*Vinnarar hjá pinkum gjørdist AB*



*Vinnarar hjá piltum gjørdist AB*



*Vinnarar hjá gentum 10-12 ár gjørdist AB*



*Vinnarar hjá smádreingum gjørdist B36 2*



*Vinnarar hjá gentum 12-14 ár gjørdist TB*

## Úttøkuvenjing til U19 landsliðið

Venjarin hjá U-19 landsliðnum hevur boðað frá, at úttøkuvenjing til U19-landsliðið verður í Runavík mikudagin 28. august. Ætlanin er at venja klokkan 17, og vant verður í góðar tveir tímar.

Hesir hava fingið boð: Bjarni Jørgensen, Rani D. Christiansen, Eli Thorsteinsson, HB, Marni Djurhuus, Búgvi Øster , Hans Pauli Samuelsen EB/Streym, Aki Petersen, Hanus Thorleifsson, Bárður Danielsen Skála, Jústinus R. Hansen, Andy Olsen, Bjarki Danielsen NSÍ, Símun Samuelsen VB, Mortan Johannesen, Bergur Midjord B36, Jann Ingi Petersen B68, Hanus Eliasen, Høgni Madsen ÍF, Kai Ennigarð, Magnus Skoralíð GÍ, Venjari er Jógvan Martin Olsen

## Beinleiðis flogferð til Budapest

Í samband við Evropa Cup dystin hjá KÍ ímóti Újpesti úr Ungarn skipar KÍ fyri beinleiðis flogferð til Budapest við Atlantic Airways. Túrurin letur seg gera m.a tí, Atlantic Airways skal flúgva spælararnar hjá mótstøðuliðnum hjá GÍ, Hajduk Split, aftur til Kroatia, og tí verða KÍ-viðhaldsfólkini tikin við úr Budapest, tá Atlantic leggur leiðina aftur til Føroya.

KÍ hevur fingið lov at selja 50 pláss í flogfarinum. Um tú vilt vita nærmari um prís o.a., so ber til at fara inn á heimasíðuni hjá KÍ, sum er www. ki-klaksvik.fo.

*phj*

**Í sambandi við, at Hoyvíkshøllin verður tikin í nýtslu leygardagin 24. august 2002, kl. 16.00**

**Tíðindaskriv**

**Skrá:**

Havnar Hornorkestur spælir

Jan Christiansen, borgarstjóri, bjóðar vælkomin

Heðin Mortensen, formaður í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs flytir fram røðu

Havnar Hornorkestur spælir

Petur Dahl, skúlastjóri, flytir fram røðu

Umboðfyri H71 flytir fram røðu

Havnar Hornorkestur

Kl. 17.00 Steypadystur H71-Kíf 1. deild menn